

*Menninir endaðu numm ar fýra í stafettini, men landsliðsvenjarin væntar sær nógv av teimum um tvey ár*

og hinar oyggjarnar helt sær allar 200 metrarnar.

Shaila millum Garðarnar legði fyri, og hon var eitt vet frammanfyri hinar, tá ið Lisbeth L. Joensen leyp út í. Hon legði Føroyar væl fram um hinar oyggjarnar, sum høvdu veikar svimjarar í hesum umfarinum.

Nathalia Reinhardt syrgdi síðani fyri, at leiðslan hjá føroyingum varð varðveitt, og so fekk yngsti svimjarin á liðnum, Elspa Mørkøre, heiðurin at svimja føroyska gullið heim á teimum seinastu 50 metrunum.

### Lagið í topp

Føroysku genturnar vóru ovurfegnar eftir sigurin, og tær vóru errnar, tá ið gullmerkini vórðu hongd um hálsin á teimum, og føroyski tjóðsangurin ljómaði í svimjihøllini í Clickimin ítróttardeplinum í Lerwick.

Tá ið Sosialurin hitti tær fýra eina góða løtu eftir sigurin, var lagið framvegis á toppinum, og tað var stuttur teinur til látur og smíl.

– Eg gjørdi tað, sum eg kundi, og so fekk eg ikki gjørt meira, segði Lisbeth L. Joensen um sín leiklut í stafettini.

Nathalia Reinhardt var triði føroyski svimjarin, og hon stúrdi fyri, at leiðslan hjá føroyska liðnum skuldi rúka, tá ið hon leyp út í.

– Eg var bangin fyri, at vit skuldu missa leiðsluna, og vendingin hjá mær kiksaði eitt sindur. Men so mátti eg bara svimja tað skjótari heimaftur fyri at halda leiðsluna, segði hon.

### Betraðu seg við fleiri sekundum

Føroyar endaðu sum nummar 3 í innleiðandi kappingini, og tá svam liðið í tíðini 1:55,38. Men tá vóru onkrir av teimum skjótu svimjarunum hvíldir, og tað sást aftur í finaluni, tá ið Føroyar stillaðu við sterkasta liðnum til frísvimjing.

Tíðin varð betrað við meira enn trimum sekundum, og 1: 52,14 var nóg mikið til at vinna gullið í hesari stafettini. Isle of Wight gjørdist nummar 2 við 1:52,54, og Guernsey nummar 3 við 1:53,13.

Sjey svimjarar vóru meldaði til hesa stafettina, og umframt tær fýra, sum svumu finaluna, vóru eisini Jutta Thomsen, Sára Ejdesgaard og Karina Petersen á stefettliðnum.



*Elspa Mørkøre og hinar fegnast um sigurin*

Á SKEIVA BEININUM



*Sólvá Joensen*

## Shortsini kundu verið minni

JÁKUP

*Tú Sólvá. Hví spæla tit í so langum shortsum. Eru tey ikki øgiliga besverlig at spæla í?*

- Jú. Tey eru nokk so besverlig. Vit burdu havt hasi strømmu shortsini, sum flogbólturin hevur.

*Tað er jú eisini tað, sum FIFA-forsetin, Sepp Blatter, hevur skotið upp. Tekur tú so undir við honum?*

- Tey eru ikki so stór allíkavæl. Kanska virka tey so hjá Malenu, men ikki hjá mær. Men eg haldi, at hesar nýggju troyggjurnar hjá okkum eru feitar.

*Jú. Tær eru flottar. Men hevði tað altso ikki verið nógv lættari at spæla í onkrum strømmum draktum. Akkurát sum rennarar ella flogbóltsspælarar?*

- Ikki ordiliga strømmum. Men tær kundu kanska verið eitt sindur tættari. Eitt nú eru hesi shortsini frá monnunum, og tey eru large, so tey kundu verið eitt sindur minni.

*Ok. Men hvat nummar brúkar tú í skóm?*

39!

## Petur Heðin var nøkunlunda nøgdur

**Landsliðsvenjarin í svimjing fegnaðist um gullið hjá kvinnustafettini, men hann helt, at úrslitini í finalunum mánakvøldið vóru eitt sindur misjøvn**

SVIMJING

*Eyðun*
*eydun@sosialurin.fo*

**Lerwick:** Landsliðsvenjarin í svimjing, Petur Heðin á Fløtti, var nøkunlunda nøgdur eftir finalurnar í 25 metra svimjihylinum í Lerwick mánakvøldið.

– Úrslitini vóru eitt sindur svingandi. Eg var eitt sindur skuffaður av onkrum. Genturnar svumu væl, tíðirnar vóru eitt sindur hips um haps, men tær svumu allar rættiliga væl, og tað týdningarmesta var at vinna gullið.

– Tað hevur verið rættiliga soltið hjá kvinnunum síðani 1997, men nú vísti tær, hvar skápið skuldi standa, tað var fantastiskt.

– Mansstafettin var ófør. Teir eru ungir, og eg vænti, at teir verða øgiligir um tvey ár. Samanumtikið haldi eg, at vit fingu helvtina av tí, sum vit komu eftir í kvøld, segði Petur Heðin á Fløtti.